# ÍF argaði oddaliðið




*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FLOGBÓLTUR** Kvinnurnar úr Fuglafirði vunnu fyrsta settið, áðrenn SÍ vaknaði og gjørdi bart

Uni Holm Johannesen

Oddurin er óbroyttur aftaná dystirnir í vikuskiftinum.

SÍ og Mjølnir, sum eru á ovastu plássunum, vunnu sínar dystir, og tískil eru kvinnurnar úr Sørvági framvegis tvey stig framman fyri nummar tvey.

Tað var hinvegin eingin avgreiðsluspurningur, tá SÍ vitjaði í Fuglafirði.

ÍF byrjaði væl og vann fyrsta settið 25-21.

### Gjørdu bart

Kvinnurnar úr Sørvági reistu seg skjótt.

Hóast tað gekk javnt á í øðrum setti, tóktist SÍ hava tamarhald á støðuni og vann 25-17.

SÍ vann síðan 25-11 og 25-22, og varðveitir tískil oddasessin.

### Greiðir sigrar

Fleyr, TB og Mjølnir vunnu greiðar sigrar í vikuskiftinum.

Fleyr vitjaði í Kollafirði og vann 3-0. Við sigrinum verður høvuðsstaðarliðið verandi á triðja plássinum.

Dráttur og Ternan hava tað trupult í hesum kappingarárinum, og tey stríðast mest um ikki at enda á aftasta plássinum.

Niðastu liðini taptu eisini greitt um vikuskiftið.

Dráttur rann bara aftaná, tá Mjølnir vitjaði. Úrslitið var 3-0, og settúrslitini vóru 19-25, 15-25 og 15-25.

Ternan, sum spælir í fremstu røð fyri fyrstu ferð, stóð seg væl í øðrum setti, men kvinnurnar av Toftum vóru ov stuttar. Annars vann TB trygt og uppiborð.

*uni@sosialurin.fo*



*Mynd: Álvur Haraldsen*

## SÍ setti Fleyr av

**FLOGBÓLTUR** Um tað ikki var staðfest frammanundan, so er í øllum førum greitt nú, at Fleyr er ikki partur av oddastríðnum longur

Uni Holm Johannesen

SÍ vann uppiborið 3-0 á Fleyr um vikuskiftið.

Við sigrinum renna sørvingar framvegis aftaná oddaliðnum. Tvey stig skilja liðini í løtuni, men SÍ hevur spælt ein dyst minni.

Fleyr er nú átta stig aftan fyri SÍ, sum er nummar tvey.

Tað er tí lítið sannlíkt, at høvuðsstaðarliðið skal stríðast millum tey ovastu liðini í dag.

### Vunnu greitt

TB royndi bara at hóra undan sum frægast, tá uppflytararnir vitjaðu hjá oddaliðnum ÍF.

Tað var mest sum ein avgreiðsluspurningur hjá fuglfirðingunum, sum vunnu 3-0.

Settúrslitini vóru 25-11, 25-11 og 25-11.

### KVINNUR:

**KÍF – Fleyr** 0-3
(23-25, 16-25 og 17-25)

**Ternan – TB** 0-3
(14-25, 24-26 og 16-25)

**Dráttur – Mjølnir** 0-3
(19-25, 15-25 og 15-25)

**ÍF – SÍ** 1-3
(25-21, 17-25, 11-25 og 22-25)

### MENN:

**ÍF – TB** 3-0
(25-11, 25-11 og 25-12)

**SÍ – Fleyr** 3-0
(25-17, 25-21 og 25-15)

### Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 8 | 7 | 1 | 21 | 10 | 11 | 14 |
| 2 | Mjølnir | 8 | 6 | 2 | 21 | 7 | 14 | 12 |
| 3 | Fleyr | 8 | 6 | 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| 4 | TB | 8 | 5 | 3 | 18 | 14 | 4 | 10 |
| 5 | ÍF | 8 | 4 | 4 | 14 | 14 | 0 | 8 |
| 6 | KÍF | 8 | 2 | 6 | 8 | 21 | -13 | 4 |
| 7 | Dráttur | 8 | 1 | 7 | 11 | 22 | -11 | 2 |
| 8 | Ternan | 8 | 1 | 7 | 7 | 22 | -15 | 2 |

### Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 9 | 8 | 1 | 24 | 5 | 19 | 16 |
| 2 | SÍ | 8 | 7 | 1 | 23 | 7 | 16 | 14 |
| 3 | Mjølnir | 8 | 4 | 4 | 13 | 13 | 0 | 8 |
| 4 | Fleyr | 8 | 3 | 5 | 11 | 20 | -9 | 6 |
| 5 | TB | 9 | 0 | 9 | 1 | 27 | -26 | 0 |